*9.a í Felagsskúlanum á Oyrarbakka*

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 1/2010: Uppskot til samtyktar um færri og størri skúlaeindir**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á Løgtingið um at gera broyting í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007, soleiðis at skúlaeindirnar verða færri og størri.

**Viðmerkingar**
Endamálið er at byggja færri og størri skúlaeindir.

Vit ynskja at fremja uppskotið fyri at samla fleiri næmingar á einum depli, og harvið skapa møguleikan fyri fjølbroyttari og betri valmøguleikum í fakum. Fáa vit eindir við nógvum næmingum, eru umstøðurnar fyri ymiskum undirvísingarhættum, á sama floksstigi til staðar. Hølisviðurskiftini og skúlaútbúnaðurin vera betri og somuleiðis eins fyri allar Føroyar

Børn og ung í Føroyum fáa eitt munagott og eins fólkaskúlatilboð, har hvør einstakur næmingur verður møttur á tí støði, hann er á, og fær tey fak, hann er góður/áhugaður í.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Kristian Martin Juul    Rói Hansen    Jónas Johannesen

Amanda Jensen    Fríðunn Jacobsen

Katrin Dánjalsdóttir